# Nógv fólk á borgarafundi í Oyndarfirði

**- Eg haldi, vit høvdu ein góðan, lívligan og ógvuliga væl møttan borgarafund, sigur Árni Joensen, bygdarráðsformaður í Oyndarfirði**

BORGARAFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Eini 80-90 fólk møttu á borgarafundinum, sum Oyndarfjarðar bygdarráð skipaði fyri á Fjalsgarði leygardagin. Hetta er eitt stórt tal av fólki í eini kommunu, sum telir 115-120 veljarar.

Umframt bygdarráð og bygdarfólk, vóru formenninir í Fuglafjarðar kommunu og Runavíkar kommunu, Sigurd Simonsen og Rodmundur Nielsen, við á fundinum. Hilmar Høgenni, sum starvast á kommunudeildini í løgmálaráðnum, var eisini við.

### Tríggjar framløgur

Tríggjar framløgur vóru, og tær tók bygdarráðsformaðurin í Oyndarfirði, Árni Joensen, sær av.

Í fyrsta lagi greiddi hann frá, hvat bygdarráðið hevur tikið sær fyri í hesum skeiðnum. Í øðrum og triðja lagi greiddi hann frá, hvussu ávikavist Fuglafjarðar kommuna og Runavíkar kommuna kundu hugsað sær, at samstarvið verður eftir eina møguliga samanlegging.

Eftir framløgurnar, var kaffisteðgur, og eftir steðgin søgdu teir tríggir, Sigurd Simonsen, Rodmundur Nielsen og Hilmar Høgenni nøkur orð.

Hilmar greiddi frá, hvørji øki kommunurnar í framtíðini koma at umsita.

Eftir hetta, var kjak um tað, sum fram er komið.

Um hálvan september fingu oyndfirðingar kunningartilfar borið á dyrnar um eina møguliga samanlegging.

Í hesum tilfari verður kunnað um fyrimunir og vansar við samanlegging, ávikavist við Fuglafjarðar kommunu ella Runavíkar kommunu.

### Lívligt kjak

Árni Joensen sigur, at fleiri spurningar vórðu reistir á fundinum.



*Ynskja oyndfirðingar at leggja saman við Fuglafjarðar-ella Runavíkar kommunu, verða tvær atkvøðugreiðslur í Oyndarfirði, ávikavist 18. og 25. november. Sambært borgarafundinum leygardagin, er stórur áhugi fyri hesum spurningi í Oyndarfirði*

- Nógv fólk nýttu høvi at spyrja, og tað vóru tey, sum høvdu fleiri spurningar, sum fundurin leið. Eg vil siga, at tað var lívligt kjak, og nógvir góðir spurningar vórðu reistir.

Spurdur, hvønn veg fólk "hella", sigur Árni, at tað dugir hann slett ikki at meta um.

- Eg trúgvi ikki, vit út frá borgarafundinum kunnu siga, hvør endaliga avgerðin hjá oyndfirðingum verður, tá ið atkvøðast skal.

Árni vísir á, at tað vanliga eru tey lutfalsliga fáu sum spyrja, meðan fjøldin lurtar.

- Men tá ið atkvøðast skal, eigur hvør borgari við valrætti sína atkvøðu. Tí er ógjørligt at siga í løtuni, hvussu útfallið tá verður, sigur hann.

### Atkvøðugreiðslur

Ein meiriluti í bygdarráðnum hevur annars samtykt, at tvær fólkaatkvøður skulu verða í Oyndarfirði um samanlegging. Men hesar verða bert tvær í tali, um fólkið á teirri fyrru samtykkir at leggja saman við aðrari kommunu.

Árni sigur, at tann fyrra atkvøðugreiðslan verður, 18. nvember og tann seinna, 25. november.

- Á tí fyrru atkvøðugreiðsluni skulu fólk taka støðu til, um Oyndarfjarðar kommuna skal leggja saman við aðrari kommunu, og verður meiriluti fyri hesum, verður á seinni atkvøðugreiðsluni tikið støðu til, hvørjari av nevndu kommunum leggjast skal saman við, sigur Árni Joensen, bygdarráðsformaður í Oyndarfirði.

## Føroyingur helt røðu fyri Evu Strøm



*Turið Sigurðardóttir*

Á samkomu í Oslo í týsdagin, tá ið Bókmentavirðisløn Norðurlanda-ráðsins varð latin svensku Evu Strøm, helt Turið Sigurðardóttir, lektari í bókmentum á Fróðskaparsetrinum, heiðursrøðuna fyri henni.

Eva Strøm fær bókmentavirðislønina fyri yrkingasavnið 'Revbensstædarna'.

Hetta er aðru ferð at fólk frá Fróðskaparsetrinum hava fingið heiðurin at halda røðu fyri høvundinum, sum fær Norðurlendsku Bókmentavirðislønina. Í 1987 helt Malan Marnersdóttir røðu fyri Herbjørg Wassmo.

# Virknir føroyingar í utlegd

**Tey, sum hava tíggumannafarið Tvørabátin í Danmark, hava nógv á skránni í komandi tíðum**

ÚTISETAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tey, sum hava tíggjumannafarið Tvørabátin í Danmark, liggja ikki á latu síðuni.

Ólavur á Heygum sum er undangongumaður í royndunum at gera føroyska bátin kendan uttanlands, gjørdi sítt til at fáa tíggjumannafarið Tvørabátin til Danmarkar og hann sigur, at báturin hevur verið nógv flotaður í ár.

Seinast hava tey fyrireikað stevnu á Lyngbyvatni við Damernes Roklub, sum eisini vóru á Norðurlendsku róðrar og mentanarstevnuni á Tvøroyri í fjør.

Men hann sogur, at nú eru eisini onnur donsk feløg komin uppí at rógva við kapp føroyskum bátum, eitt nú SAS Roklubben í Kastrup.

Tvørabáturin róði eisini á víkingastevnu í Frederikssund í juni mánaða.

Og tað næsta á skránni er so ársveitslan, sum verður leygarkvøldið 8. november í Føroyahúsinum í Keypmannahavn.

Og har verður gjørt nógv burturúr: Jan Hougård, sum arbeiðir í Danmarks Radio verður borðfúti og úr Føroyum kemur Atli Dam, sum var løgmaður í mong ár, at halda røðu.



Harafturat verður eisini okkurt skemt at hoyra og síggja, umframt at nógvir ymiskir vinningar verða lutaðir burtur.

Ólavur á Heygum sigur, at Maersk Air hevur stuðlað teimum við flogferðum til og úr Føroyum frá Maersk Air,

Hann sigur, at somuleiðis verður arbeitt víðari við stóru norðurlendsku róðrar- og mentanarstevnuni í Slesvík í døgunum frá 5.-8. august komandi ár.

Tað er Ólavur á Heygum sjálvur, sum skipar fyri stevnuni saman við Birger Kuhl úr róðrarfelagnum í Slesvík

Í hesi stevnuna fara tey at brúka sama búmerki, sum Jón Einarsson gjørdi til stevnuna á Tvøroyri í fjør. Stevnan í Slesvík er samstundis 1200 ára minningardagur hjá víkingastaðnum Hedeby í Slesvík.

Næsti fundur at fyrireika stevnuna, verður sætta desember í nýggja húsinum á Bryggjuni, sum tey norðurlendsku londini fáa saman í Keypmannahavn og har fara feløg og stovnar, sum hava áhuga fyri tiltakinum at fáa fundarboð.

## Nýggj fólk í nevndina

**Á eykaaðalfundinum í Fuglafjarðar Sjónleikarfelag um vikuskiftið var øll nevndin skift út. Nú verður søkt eftir nýggjum leiðara**

MENTANARHÚSIÐ
*Tíðindaskriv*

Eykaaðalfundur var í Mentunarhúsinum í Fuglafirði fríggjadagin tann 24. oktobur 2003.

Á fundinum varð nýggj nevnd vald, og hon hevur skipa seg soleiðis:

Formaður, Elin Sleiri. Næstformaður, Per Christensen. Kassameistari, Mike George.

Skrivari, Kristina Larsen. Nevndarlimur, Jógvan Philbrow. 1. Tiltakslimur, Kristianna Jacobsen.

2. Tiltakslimur, Magni Poulsen.

Eygleiðari fyri Fuglafjarðar kommunu er Jóhan Heri Joensen.

Nevndin er farin til verka, og ein av fyrstu uppgávum hjá nýggju nevndini er at seta leiðara til húsið, sum í eina tíð ikki hevur havt fastansettan leiðara.

Søkt verður í bløðunum eftir leiðara.



# Páll skerjir MBF í ári teirra brekaðu

**Tað kemur dátt við hjá limafeløgunum í Meginfelag teirra Brekaðu, at landsstýrismaðurin, Páll á Reynatúgvu, skerjir játtanina til MBF við hálvari miljón – júst í ári teirra brekaðu.**
**- Hetta signalerar, hvønn dent landsstýrismaðurin leggur á arbeiði hjá okkum, sigur dagligi leiðarin á MBF, Anna Suffía Durhuus**

SKERJING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í fleiri ár hevur Meginfelag teirra Brekaðu, MBF, fingið 900.000 krónur á løgtingsfíggjarlógini. Undir kreppuni fyrst í nítiárunum varð játtanin skerd við 100.000 krónum, men hesin peningur kom uppá aftur játtanina, tá ið útlitini batnaðu.

Í fjør hendi so tað, at landsstýrismaðurin, Páll á Reynatúgvu, læt MBF fáa hálva miljón aftrat, soleiðis at samlaða játtanin í ár er 1,4 milj. krónur. Men hesin peningur steðgar ikki leingi á fíggjarlógini, tí longu í ár – í ári teirra brekaðu – er játtanin aftur skerd við hesi somu hálvu miljónini.

### Standandi játtan

Í Sosialinum herfyri segði Leila Solmunde, formaður í Giktafelag Føroya, sum er limur í MBF, at ætlanin hjá Pálli avgjørt ikki var, at henda hálva miljónin bert skuldi vera á fíggjarlógini í ári teirra brekaðu – og síðan takast av aftur.



*Marjun Sigurðsdóttir er formaður í MBF. Hon er í løtuni burturstødd. Dagligur leiðari er Anna Suffía Durhuus.*

Dagligi leiðarin á MBF, Anna Suffía Durhuus, er samd við Leilu og sigur, at upprunaliga ætlan landsstýrismansins avgjørt ikki var, at meirjáttanin skuldi takast burtur aftur.

Tær vóru báðar við á fundum við Páll, tá ið hesin kunngjørdi, at meira peningur fór at verða játtaður MBF.

- Men seinni hevur Páll á Reynatúgvu so sagt og endurtikið, at meirupphæddin varð sett á fíggjarlógina fyri at stuðla MBF og tess limafeløgum í ári teirra brekaðu.

Anna Suffía sigur, at upprunaliga var hetta ikki so, tí árið varð ikki lýst at vera ár teirra brekaðu, tá ið landsstýrismaðurin segði seg vilja seta meira pening á fíggjarlógina til MBF.

Dagligi leiðarin sigur, at endamálið við meirjáttanini var at styrkja feløgini og at fáa feløgini undir ein hatt, sum hon tekur til.

- Slíkt verður ikki gjørt eftir einum ári, leggur hon dent á.

Anna Suffía sigur, at MBF er ógvuliga vónsvikið um, at játtanin aftur verður skerd.

### Vónsvikin feløg

- Nei, hetta høvdu vit slett ikki væntað. Hóast umleið ein helmingur er brúktur til tiltøk í ári teirra brekaðu, munaði hin helmingurin ógvuliga væl hjá limafeløgunum. Vit mugu bara staðfesta, at ætlaða skerjingin signalerar, hvønn dent landsstýrismaðurin leggur í tað arbeiði, vit og limafeløgini gera.

Hon vísir á, at umframt at fáa beinleiðis lut í býtinum av meirjáttanini, fingu limafeløgini eisini stuðul av somu játtan til ymiskt tiltøk, ið skipað hevur verið fyri í ári teirra brekaðu.

- Hevði játtanin verið hin sama aftur komandi ár, hevði uppaftur meira peningur farið útaftur til feløgini, tí tá hevði minni peningur farið beinleiðis til ávís tiltøk. Limafeløgini vóru ógvuliga fegin um meirjáttanina í ár, og líka so fegin tey vóru – líka so vónsvikin eru tey, nú meirjáttanin er tikin av aftur, sigur Anna Suffía.

### Býtislykil

MBF hevur 23 limafeløg, harav trý feløg, Javni, Sinnisbati og ÍSB, hava eina beinleiðis játtan á fíggjarlógini og soleiðis ikki eru heft at MBF fíggjarliga.

- Tey feløg, sum eru á fíggjarlógini, fáa bara grundarupphæddina, meðan hini feløgini, sum eru limir í MBF og ikki eru á fíggjarlógini, fáa grundarupphædd umframt part av játtanini, sum verður býtt eftir einum lykli, har limatalið er avgerandi fyri, hvussu stór játtanin verður, sigur Anna Suffía Durhuus.

Limafeløgini í MBF eru ymiskt til støddar og ymiskt er, hvør er limur í feløgunum. Í summum feløgum eru bert tey limir, sum eru sjúk, og í øðrum feløgum eru avvarðandi og stuðlar eisini limir.

MBF hevur í skrivum gjørt vart við sína ónøgd hjá landsstýrismanninum og hjá trivnaðarráðnum.

## Páll ikki at hitta

SKERJING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sosialurin royndi fyrrapartin í gjár at fáa fatur á Páll á Reynatúgvu, landsstýrismanni, men tað eydnaðist tíverri ikki, hóast vit bæði tosaðu við Almannamálaráðið og ringdu á fartelefonina hjá honum.

Væntandi fáa vit eina viðmerking frá landsstýrismanninum ella aðalstjóranum, Sólju í Ólavstovu, um ætlaðu skerjingina av játtanini til MBF, Meginfelag teirra Brekaðu, til blaðið hósdagin.



*Páll á Reynatúgvu, landsstýrismaður, var ikki at hitta fyrrapartin í gjár. Væntandi fáa vit eina viðmerking um skerjingina til blaðið hósdagin*

## Fløvin hugnaløtu í Kvinnufelagshúsinum



*Jensina Simonsen, sum er útbúgvin sjúkrarøktari, er sett at taka sær av Fløvanum. - Eg gleði meg at byrja í nýggja starvinum, sigur hon*

**Dagtilhaldið Fløvin, hevur fingið nýggjan leiðara**

DAGTILHALD
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

**Glyvrar:** Mánadagin, 3. november kl. 15, letur "FLØVI" - dagtilhald fyri pensjónistar – uppaftur í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Hetta er 15. árið, at dagtilhaldið hevur opið.

Kvøldið byrjar við hugnaløtu og borðhaldi.

Meinhard Bjartalíð, prestur, fer at siga frá lívi sínum, og Jóhan Mortensen fer at undirhalda við harmoniku og sangi. Eisini fara Fríðhild og Bodil at spæla tvørfloytu.

### Nýggjur leiðari

Nýggjur leiðari er settur at taka sær av Fløvanum. Tað er Jensina Simonsen, sum er útbúgvin sjúkrarøktarfrøðingur.

Hon gleðir seg at byrja í nýggja starvinum.

Virksemið hjá dagtilhaldinum er í menning, og tilhaldið er opið fyri øllum pensjónistum í Eysturoynni.

- Vit leggja stóran dent á, at so nógv sum gjørligt koma at

vitja og ynskja, at fólk, sum eru óhjálpin, verða hjálpt av avvarðandi, soleiðis, at tey kunnu koma trygd til og frá staðnum, sigur Dagtilhaldið Fløvin í tíðindaskrivi.

Fløvin hevur annars opið í Kvinnufelagshúsinum frá mánadegi til fríggjadag, frá kl. 15-18.

## Symfoniorkestrið hevði konsert

Sunnudagin hevði Føroya Symfoniorkestur konsert í Norðurlandahúsinum. Hetta var ein stórfingin konsert, tí krevjandi tónleikur var á skránni.

Verk eftir Dimitri Sjostakovitj og Pjotr Tjaikovskij vórðu spæld.

Jóhannes Andreasen var solistur á klaveri, og Bernhardur Wilkinson var dirigentur.

Í blaðnum í morgin hava vit meira um hesa konsert.



*Føroya Symfoniorkestur hevði konsert í Havn sunnudagin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*